# TRYGDAR-ÚTGERÐ

## TIL BÁTIN



VØRN

## Trygdarútgerð til bátin

Tað er lógarkrav, at nøktandi trygdarútgerð er í bátinum. Alt eftir støddini á farinum, eru krøvini ymisk og her kanst tú kunna teg um hvat skal til, fyri at tú fært eina so trygga ferð sum tilber.

- Hav altíð kravda trygdarútgerð umborð, og lærið tykkum at nýta hana.
- Kannið veður, vind og streym áðrenn farið verður.
- Siglið ikki ávirkaði og troytt.
- Nýtið flótidraktir og bjargingarvestar.
- Sjógvurin á okkara leiðum er kaldur, sera kaldur.
- Tórshavn Radio hevur fólk á vakt alt samdøgri. Tey eru fús at svara til eina radioroynd ella um okkurt er áfatt.



# LØGTINGSLÓG NR. 25 FRÁ 12. APRÍL 2006

**Bjargingarútgerð á opnum bátum og førum undir 20 bruttotons.**

## FRÁ 24 FÓT/7,44 M OG UPPEFTIR

Á opnum bátum frá áttamannafari (24 fót/7,44m) og uppeftir og deksførum undir 20 tons (BT), skal henda útgerð vera umborð, tá ið lagt verður frá landi:

1. Kumpass, sum á deksførum skal vera føst uppsett.
2. Floyta, tó soleiðis, at um báturin er styttri enn 12 m, floyta ella blásilúður.
3. Mastur, segl, árar og bátshaki, har hetta er verkliga gjørligt.
4. Eldsløkkjari, 6 kg pulvur.
5. Minst 2 pøsir.
6. 3 neyðrakettir, 3 neyðbluss og lummalykt.
7. Varp við ílatogi.
8. Bjargingarbelti, -vestur ella bjargingarbúni til hvønn persón.
9. Neyðsendari av VHF slagi, ikki berbarur, men fastgjørdur umborð.
10. Siglingarljós.
11. Radarreflektor.
12. Skipsskjøl, vegleiðingar og uppsløg, sum eru kravd. Føroyskur álmanakki og sjókort yvir sigliøki.
13. Bjargingarkransur við línu, sum er 27,5 m.

## MINNI ENN 24 FÓT/7,44 M

Bátar, minni enn áttamannafar (24 fót/7,44m), men størri enn 20 fót/6,20m, skulu hava hesa útgerð umborð, tá ið lagt verður frá landi:

1. Kumpass.
2. Blásilúður ella floytu.
3. Mastur, segl, árar og bátshaka, har hetta er verkliga gjørligt.
4. Føroyskan álmanakka.
5. Pøs.
6. Bjargingarbelti ella -vest til hvønn persón.
7. Neyðrakett ella neyðbluss og lummalykt.
8. Varp við ílatogi.
9. Radarreflektor.

## MINNI ENN 20 FÓT/6,20 M

Bátar, minni enn 20 fót (6,20 m), skulu hava hesa útgerð umborð, tá lagt verður frá landi:

1. Bjargingarbelti ella -vest til hvønn persón.
2. Árar.
3. Pøs.

§

Kappróðrarbátar koma ikki undir reglurnar í §§ 2, 3 og 4 í hesi lóg. Før, sum verða nýtt til ferðafólkaflutning, skulu hava útgerð sum ásett í reglunum hjá Skipaeftirlitinum.

Fiskiveiðieftirlitið hevur eftirlit við, at lógin verður hildin og hevur rætt til uttan rættarúrskurð at fara umborð á før at gera neyðugar kanningar.

Brot kunnu verða revsað við bót.

## Tað loysir seg at hava trygdarútgerðina í lagi

Í løgtingslóg nr. 25 frá 12. apríl 2006 um bjargingarútgerð á opnum bátum og førum undir 20 tons verður millum annað tilskilað, at Fiskiveiðieftirlitið í einum sektaruppskoti kann boða frá, at mál kunnu verða avgjørd uttan rættarviðgerð, um tann, ið hevur framt brotið, játtar seg sekan í brotinum og váttar at gjalda bótina samsvarandi sektaruppskotinum innan nærri ásetta freist.

## Vegleiðandi gjøld fyri brot

| **Bjargingarútgerð, sum skal vera umborð** | **Fyri hvørja vantandi eind kr.** |
|---|---|
| Kumpass, sum á deksførum skal vera føst uppsett | 1.500,- |
| Floyta, tó soleiðis, at um báturin er stytri enn 12m, floyta ella blásilúður | 300,- |
| **Mastur, segl, árar og bátshaki har hetta er verkliga gjørligt** | |
| Segl | 1.800,- |
| Bátar minni enn 20 fót skulu hava árar | 1.000,- |
| Eldsløkjari, 6 kg, pulvur | 750,- |
| Minst 2 pøsir (Er báturin minni enn áttamannafar 1 pøs) | 40,- |
| **3 neyðrakettir og 3 neyðbluss og lummalykt** | |
| Neyðrakett | 300,- |
| Bluss/lummalykt | 100,- |



| **Bjargingarútgerð, sum skal vera umborð** | **Fyri hvørja vantandi eind kr.** |
|---|---|
| **Varp við ílatogi** | |
| Varp | 400,- |
| Ílatog | 600,- |
| Bjargingarbelti, vestur ella bjargingarbúni til hvønn persón | 1.000,- |
| Neyðsendari av VHF slagi, ikki berbarur, men fastgjørdur umborð | 2.500,- |
| Siglingarljós | 400,- |
| Radarreflektor | 200,- |
| **Skipsskjøl, vegleiðingar og uppsløg, sum eru kravd** | |
| Føroyskur álmanakki | 400.- |
| Sjókort | 300,- |
| Uppslag fyri radioloyvið | 500,- |
| Bjargingarkransur við línu, sum er 27,5 m | 1.000,- |

** Fyrivarni verður tikið fyri slag- og prentvillum.*

**Vørn**

Yviri við strond 3
Postrúm 1238
FO-100 Tórshavn
Faroe Islands

Tlf. +298 311 065
Fax +298 313 981
E-mail vorn@vorn.fo

©ONUPLAVIRKID